VIÐMERKINGAR

Hugleiðingar í sambandi við útgávu av lagasavni til Songbók Føroya Fólks

Ólavur Hátún



Tá ið talan er um tónleik í Føroyum, hevur tað undrað, at vit her í landinum ongi ljóðføri hava havt og tí ongan serføroyskan instrumentalan tónleik eiga frá eldri tíð. Ymsir tankar hava verið frammi um, hví so hevur verið. "Ongin viðavøkstur og tí onki tilfar til ljóðføri", heldur onkur. Neyvan man tað vera orsøkin, tí føroyingar hava smíðað bæði hús og bátar og ikki so lítið av amboðum og búnyttum, so saktans høvdu viðasprek verið fyri hond til eisini tónleikatól. "Vit vóru so fjarskotnir, høvdu lítið og onki samband við umheimin í teirri tíð, tá instrumentalur tónleikur hevði tikið seg upp inni á meginlandinum". Nei, siga søgumenn, sambandið fyrst og fremst við móðurlandið Norra var ikki so vánaligt sjálvt í teirri myrku miðøld, og hygg at íslendingum, teir høvdu jú síni langspil, sum við sínum sermerkjum sipa til samband við kontinentalan tónleik.

Nei, man ikki orsøkin til, at ljóðføristónleikur ikki hevur vunnið sær ræsur inn í føroyskt mentanarlív í gomlum døgum heldur vera tann, at tað sangliga og tá helst kvøðingin, frásøgnin í kvæðunum og tann eggjandi kvæðarytman hava havt slíkt tak á fólki her, at tað ikki hevur verið rúmd fyri øðrum? Tann allmikli kvæðaarvurin frá miðøld og upp gjøgnum øldir, sum Emil Thomsen við sínari snotiligu heildarútgávu nú hevur gjørt almanna atkomiligan, man bera sín greiða boðskap um tann møguleikan.

Tá ið nýtt tíðarrák fór at bera við eisini her hjá okkum fyri um 200 árum síðan, var tað tí eisini natúrligt, at tað var kvæðayrkingin, sum fekk sína endurføðing. Við næsta tíðarhvarv fram móti næstseinasta aldarskifti var tað framhaldandi gamli kvæðastílurin, sum eyðkendi nýføroyska skaldskapin og sangmentanina. Men um hetta mundið fóru eisini nýggir tónar at ljóma í samkomum føroyinga millum, sangir við meira nýtíðarligum sniði og oftast til útlendskt, helst norðurlendsk løg, men við rótføroyskum innihaldi. Slóðari í hesari nýggju leið mundi vera Fríðrikur Petersen, seinni Føroya próstur, sum hóast tað lítla í vavi, sum hann skaldsliga legði úr hondum, man vera at rokna sum kanska tann fremsti millum okkara fosturlandsyrkjarar. Men illa slepst undan í hesum sambandi at bera við tað vanlukkuliga, at júst hesin edilingur saman við øðrum mentanarligum undangongumonnum hálsaði so heilt um í sínum hugsjónum, tá tvídráttur um tjóðskaparligu viðurskiftini í Føroyum tók seg upp. Ikki bert tagnaði skaldaræðin, men hesir góðu menn gjørdust meinastu mótstøðingar móti fullari viðurkenning av máli okkara.

Hetta verður ikki nevnt til tess at skemma minni um mætar menn; men júst tann politiska víðferð, sum føroyskum máli varð fyri, gjørdist tann brandur, sum meira enn nakað birti upp til ta tjóðskaraligu veking í Føroyum, sum júst Songbók Føroya Fólks er í myndin av. Ikki mundi tað vera av tilvild, at hesin hornasteinur í føroyskum mentanarlívi, kom út á fyrsta sinni í 1913, árið eftir at løgtingsmenn høvdu samtykt eina 7. lógargrein, sum álvarsliga skerdi móðurmálsins rættindi innan kirkju- og skúlagátt. Heldur ikki var tað nøkur tilvild, at tað júst var háskúlamaðurin Rasmus Rasmussen, sum var ein stigtakarin til hesa útgávu. Tí frá fyrsta stovningardegi í 1899 var Føroya Fólkaháskúli aðal grúgvusteinurin til mentanarliga menning í Føroyum. Her varð talað og sungið á føroyskum, og her komu teir allir til orða : I. P. Gregoriussen, Rasmus Effersøe, áðurnevndi Fríðrikur Petersen, Jóannes Patursson, skaldabrøðurnir Janus og Hans Andrias Djurhuus, háskúlamenninir sjálvir Símun av Skarði og Rasmus Rasmussen, Mikkjal á Ryggi, Jákup Dahl, Nyholm Debes og aðrir fleiri við teimum. Hesin háskúlasangur gav endurljóð millum ungdóm og við samkomur úti um landið, og hóast málsliga haftið so ljómaði hann eisini innan skúlaveggir víða hvar.

Mín egna sangliga tilvitan hevur eisini støði í Songbók Føroya Fólks. Minnist tær slitnu sangbøkurnar í Kvívíkar skúla, tá ið vit komu hagar. Vermóðir Jóhanna Jensen, sum var lærari har undan pápa mínum, var ikki sangari; men eg hoyrdi seinni frá donskum sanginspektøri, sum hevði verið á vitjan í Føroyum, at neyvan hevði hann hoyrt ramligari skúlasang enn har á staðnum. Av fullum huga sungu vit eisini hesar føroysku sangir í mínari skúlatíð. Pápi mín hevði onki nomið av slíkum á læraraskúlanum í Havn; men hann hevði verið á háskúla, og tað var neyvan sangur í føroysku sangbókini, sum hann ikki kundi læra okkum.

Minniligar vóru hesar sangløtur frá barnaárum, og serliga minnist eg eini jól, tá vit bæði eldru systkin fingu nýggjar Songbøkur Føroya Fólks til gávis. Tær vóru so snotiligar við skinnpermu og silkipappíri, onnur blá og hin svørt, og ar tær lógu í hondunum, og hvussu spennandi tað var at blaða í teimum.

Jú, Songbók Føroya Fólks hevur nú í brátt hundrað ár fylgt føroyingum frá barnadøgum og upp í ellisár. Men tíðir skifta, og tíðarinnar tonn fer ikki so væl við øllum, sum áður hevur havt virði og áhuga. Tað er tí umráðandi bæði at kunna varðveita tað dygdargóða frá eldri tíð og at duga at taka skilagott ímóti tí nýggja. Tí er tað so heppið, at hetta so væl hevur verið havt í huga í seinastu útgávu av Songbók Føroya Fólks, so at henda okkara meginsangbók ikki gerst ein avoldaður fornlutur, men støðugt hevur samband við tað livandi sanglívið í landinum.

Í fleiri áratíggju hevur ynski verið um at fáa útgivið lagasavn til Songbók Føroya Fólks. Fleiri hava havt hugskot um hetta, og fyri knappliga fjøruti árum síðan settu vit báðir Hans Erland í Brekkunum okkum fyri at fara undir uppgávuna. Ikki var tað Hans Erlandi fyri at kasta, at onki spurdist burturúr, og mangan havi eg iðrað meg eftir, at mín lutur lá eftir. Men fylgjandi við, hvussu vandaliga Zacharis er farin til verka, og nú hetta digra bókaverk liggur á borðinum, er tað sanniliga bert at frøast um, at tað var hann, sum framdi ætlanina. Saman við Mariannu Clausen, sum fyrr í vetur læt úr hondum sítt megnarverk við føroyskum kvæðaløgum, hevur Zacharias Sørensen nú við hesari útgávu vunnið sær virðiligt sæti í føroyskari tónleikasøgu.

Hvat vil Absalon við SEV?

Jón Gaasedal

28. apr. 2004 hevði Absalon í Buð eitt lesarabræv í Dimmalætting undir yvirskriftini: Hvat vilja vit við SEV?

Settist spentur at lesa, hvat Absalon vildi við SEV, tí sjálvur havi eg ikki dugað at funnið nakað skilagott at nýta SEV til. Men hetta hevði Absalon einki boð uppá sjálvur.

Gamaní, so tørvar mær el-megi til so mangt, sum so mangur annar, men um veitarin eitur SEV ella okkurt heilt annað, tað er mær so flúgvandi líkamikið. Bara streymurin er bíligur, álítandi og sunnur fyri Føroya Land og Fólk, so eri eg nøgdur. Einki av hesum uppfyllir SEV - og tað so langt frá!

Absalon skrivar, at 49.000 føroyingar eiga 85 krónur í part í SEV, og kunnu øll hesi fólkini tann dagin í dag kanna sær 5.100 krónur í eginognini hjá SEV, og at øll eiga SEV, og ein króna í yvirskoti har kemur hvørjum tí einasta føroyingi til góðar.

Tað er fullkomiligur ørskapur at skriva slíkt! Sum at hoyra orð frá vitleysum manni! Hvar kann eg heva hesar 5.100 krónurnar??? Eg veit um ein - sum Absalon kennir øgiliga væl - sum kundi heva 40 milliónir við kassa 1 hjá SEV! Kann palliba eisini tað?

Nei! SEV hevur skuldarbundið hvønn tann einasta føroying næstu 50-100 árini við sínum vitleysu íløgum, ið einans geva nakað í lumman hjá ávísum persónum við tilknýti til SEV. Við einum KWh prísi á uml. 1,35 krónur, so hórar SEV so dánt undan. Og her skal leggjast afturat, at tá hevur landið longu goldið helvtina av oljurokningini hjá SEV. Í Danmark er streymurin bíligari - hóast risa avgjøld eru løgd omaná el-rokningina til brúkaran. Hugsað um hetta eina løtu.

Eg játti her alment, og bindi meg til, at Absalon í Buð skal eiga mínar 5.100 krónur, ið eg eigi hjá SEV, treytað av, at hann eisini yvirtekur mína skuld haðani.

Loyvi mær at endurgeva orðarætt: "Øll eiga SEV. Ein króna í yvirskoti har kemur hvørj?um tí einasta føroyingi til?góðar.

Hóast hetta er tað onkur, ið vil koma hesum 100% fólkaognar felagsskapi til lívs. Vita skulu tit profitt?-greðingar – fyri hvørja krónu, tit stinga í lumman og drena SEV, tess tyngri gera tit møguleikan fyri, at vit klára at halda lívið í Hattarvík, Dímun og Mykinesi."

Ha ha. Her sæst hvussu kroyst monopol-fyritøkan SEV er. Eg má flenna. Kann ein slíkur maður sita sum umboðsnevndarlimur í SEV? Ei undur í, at SEV er komið út á ytstu rók, um hetta er tann generelli førleikin hjá hesum fólkum, ið mynda leiðslu og stýri í SEV. Eg vænti ikki, at leiðslan á SEV er glað fyri títt lesarabræv, og hvaðna minni mína viðmerking. Profitt-greðingarnir, hvørjir eru teir? Man talan vera um p/f Røkt, ella er talan um øll tey, sum kundu hugsa sær at liva her um 5 ár, og um sum ikki blint elska og tilbiða SEV? Hvat ólukkan er SEV? Ein gudur?

Nei, SEV varð stovnað við einum góðum endamáli í hyggju, og varð til fyri Føroya Fólk - og ikki øvugt! Í dag eru Føroya Fólk til fyri SEV, og SEV er til fyri nakrar spekulantar. Tað er har tú skalt søknast eftir tínum profitt-greðingum - ikki aðrastani.

Hattarvík, Dímun og Mykines skalt tú ikki vera bangin um. Tær hava onga neyð. Vit, ið eru uppgraderaði seinastu 20 árini, vit síggja loysnir á slíkum. Tykkara loysn er at flyta oljutunnur við tyrlu til Dímunar. Hetta man vera uml. 500 krónur fyri liturin. Álvaratos, hetta kann gerast betri og bíligari, tað kann eg lova tær.

Absalon, sannleikin er sjálvandi tann - sum tú eisini vísir á, at um ein vindorkuútbygging, ið ikki er stýrd av SEV, fer fram her á landi, so verður tað eitt øgiligt framstig fyri Føroya Land - skipaflotin íroknaður. Men ikki fyri SEV - tað fer so dundrandi á heysin, og skattgjaldarin stendur eftir við rokningini (tað ger hann óansæð)! Hvussu skal SEV kappast við vindorkufrmleiddan streym fyri 1 til 12 oyru pr. KWh?

SEV er bara ein el-veitari. Eg seti Føroya Land framum SEV - sjálvsagt, og ein fyritøka, ið ikki ber seg, eigur ikki at verða hildin á lívi. Mínir kæru landsmenn eru týdningarmiklari enn ein lúsa el-framleiðari. Pensionistarnir skulu ikki sita kaldir, tá oljukreppan kemur. Skipaflotin skal ikki leggjast, tá oljukreppan kemur. Hon kemur!

Tað syrgiliga er, at sjálvt um hetta landið framleftir fær atgongd til bíligan streym, so mugu vit øll framhaldandi gjalda ørskapin hjá SEV aftur í fleiri ættarlið - yvir skattin. Og tí má øll útbygging hjá SEV steðgast - og tað í stundini! Beint NÚ!

Eg vóni, at tú og onnur hava fingið nakað at hugsa um, og við vón um eina bjarta, lýsandi og fjálga framtíð fyri okkum øll.

Ljós yvir landið!

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Til minnis um Leon Gunnar



Góði Leon Gunnar!

Eg vil her skriva nøkur orð um teg, soleiðis sum eg havi kent teg. Mamma tín og eg gingu til føðifyrireiking saman hjá ljósmóðrini Bjørg. Síðani møttust vit øll heima hjá øllum einaferð. So steðgaði tað.

Men seinni gjørdust tú og sonur mín Niels Peter bestu vinmenn. Tað var í eina summarfrítíð – tit gingu í 2. ella 3. flokki – og allir hinar dreingirnar í flokkinum vóru farnir út at ferðast. Tá funnu tit báðir saman sum vinmenn.

Eg minnist, tá tit vóru her hjá okkum, at tit altíð spældu við lego. Tit bygdu uppi á loftinum og oman gjøgnum trappurnar – tosaðu og ímyndaðu tykkum alt møguligt. Ja, onkuntíð lurtaði eg eftir tykkum, uttan at tit vistu av tí.

Skjótt vuksu tit frá at spæla við lego, og aftaná tað vóru tit mest heima hjá tær, Leon Gunnar. Har spældu tit m.a. við teldu og telduspølum, tit vóru á verkstaðnum hjá pápa tínum ella niðri í bátinum. Einaferð vóru tit til útróðrar við pápa tínum, og Niels Peter kom errin heim við fiski. Ofta vóru tit við pápa tínum í bilinum runt oynna. Hjá tykkum var mangt at takast við, sum dreingir hava áhuga í, og Niels Peter hevur havt óteljandi góðar tímar saman við tær. Hann kom næstan bara heim fyri at eta og sova, so hann hevur følt seg væl hjá tykkum og saman við tær.

Tú átti góð foreldur, Leon Gunnar, sum gjørdu alt so væl fyri teg og hjálptu og vardu teg. Tú kundi altíð ringja eftir pápa tínum, so kom hann 5 min aftaná í bilinum.

Góði Leon Gunnar, eg kom at kenna teg sum ein sera fittan og fyrikomandi drong, og eg var fegin um vinskapin millum teg og Niels Peter. Tit trivdust væl saman. Tá ið tit onkuntíð vóru blivnir óvinir, var tað hvørja ferð tú, Leon Gunnar, ið rætti hondina fram, og tit blivu væl aftur.

Mær dámdi teg so væl, Leon Gunnar, og eg eri takksom fyri tey árini Niels Peter fekk saman við tær.

Ærað veri minnið um teg.

Mamma Niels Peter

Tøkk

Vit takka tykkum øllum hjartaliga, ið á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

Jacob Johannes Joensen
Hvannasund

fór heim til Harran.

Tøkk fyri alla hjálp, blómur, kransar og gávur. Tøkk til samkomuna í Hermon fyri alla ta hjálp, tit veittu okkum og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til gravar.

Familjunnar vegna

Malan, Alvilda, Gudmar, Tórmund og Thorleif

Filippibrævið 1,21

Dagurin

11. mai. Mamertus, deyður í 475. Biskupur í Suðurfraklandi; tikin av døgum.

Silvurbrúdleyp

Í dag, 11. mai, hava hjúnini Súsan og Anfinn Norðbúð, búsitandi í Nejstlunden 40, 9850 Hirtshals, silvurbrúdleyp. Dagurin er hildin.

Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Elisabeth M. Mortensen
Sevmýru, Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkini á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri, fyri tykkara stóra hjálpsemi ígjøgnum árini. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur, og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Johannes

MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

Ringið tel 341800 Sosialurin

Tøkk

Ein tøkk til tykkum øll, sum við gávum, fjarritum og góðum orðum gjørdu mær 80 ára dagin so ógloymandi.

**Frits Mortensen
Trongisvágur**

†

Kunngjørt verður at

Paul Kjerstad
Vestmanna

andaðist á eldrasambýlinum í Vestmanna sunnumorgunin.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

Jonna

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður mín, pápi, abbi, bróðir og verfaðir okkara

Dánial Chr. E. Joensen
bóndi, Á Kjalnesi

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 9. mai, 62 ára gamal.

Farið verður úr Kapellinum týsdagin kl. 17.00. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00 úr Kollafjarðar kirkju.

Vegna tey avvarðandi

Emly, Ann, Thomas, Jóan Jakku og Eddie

Tey, ið vilja minnast Dánial, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina peningagávu.